## Umsiting betri pláss

Umsitingin hjá Sunda kommunu hevur fingið betri hølisviðurskifti í umsitingarhúsunum á Oyrarbakka. Fyrr húsaðist umsitingin í loftshæddini, men tá kommunulæknin flutti úr hølunum á niðaru hædd, varð avgjørt at innrætta tey hølini til umsitingina hjá kommununi. Nú er móttøkan so flutt í niðaru hædd, har leiðararnir fyri teknisku og sosialu deild eisini halda til. Hølini eru gjørd soleiðis, at illa gongd og fólk í koyristóli sleppa væl inn.

## Sluppin dagførd

Felagið Sluppvinir hevur nú dagført heimasíðuna hjá Sluppini. Nú kunnu áhugað fylgja við, hvat er á skránni í næstum, og har sæst millum annað, at í løtuni verður arbeitt við at rigga sluppina til til summarið. Á heimasíðuni eru eisini myndir frá túrinum í Stavanger í fjør, og vil onkur hava myndir frá øðrum ferðum á heimasíðuna, so er bara at senda felagnum tær í telduposti. Á heimasíðuni er eisini oyðublað, sum nýggir limir kunnu brúka.

# Týr á Summarfestivalinum

**Eyðkendi kvæðarokkurin hjá Týr fer aftur í ár, at ljóma um Vágsbø, tá bólkurin á síni einastu framførslu í Føroyum í summar vitjar Summarfestivalin**

SUMMARFESTIVALURIN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Skráin hjá Týr í summar er merkt av nógvum konsertum uttanlands, millum annað á nógvum stórum festivalum. Men av tí, at ein framførsla varð avlýst, fekk bólkurin eitt hol í skránni, ið loyvdi teimum, at koma aftur á Summarfestivalin, ið hevur verið karmur um nakrar av bestu framførslunum hjá Týr í Føroyum. Týr fer á pall leygarkvøldið á Summarfestivalinum, Hetta varð avdúkað á serligari festivalsending, sum varð send á Rás1 hjá Televarpinum í vikuskiftinum.

Í fjør lá ikki fyri hjá Týr at luttaka á Summarfestivalinum, hóast fyrireikararnir fegin vildu hava bólkin, tí gleðast fólkini handan Summarfestivalin almikið um, at bólkurin luttekur í ár..

### Settu McFadden upp á pláss

Á teimum báðum fyrstu Summarfestivalunum var Týr partur av skránni, eftir festivalin í 2005 skrivaði ummælarin hjá Sosialinum soleiðis um framførsluna hjá Týr:

"Onkur hevði hug at finnast at skránni friggjakvøldið, at seta kvæðarokkbólkin Týr at spæla aftan á Brian McFadden kundi kanska tykjast løgið. Men Týr smæddust ikki burtur, og teir fýra tónleikararnir tyktust slettis ikki merktir av, at eitt heimsnavn hevði staðið á pallinum beint áðrenn teir. Týr góvu áhoyrarunum eina framúr konsert, sum varð ein tann besta á festivalinum, og sum var tann besta festivalkonsertin hjá Týr í summar.

Kvæði, vísur og tungmálsløg vórðu framførd ordiliga væl, og eina løtu var fremsti partur av Vágsbøi umskaptur til eitt stórt dansigólv, jørðin skalv, tá ung sum gomul slóu ring, og dansaðu til Ormin Langa. Hendan rokktulkingin hjá Týr av mergjaða kvæðnum er vorðin fólkaogn í Føroyum, og er vorðin ein livandi partur av okkara mentan. Hon rakar føroysku fólkasálina beint í hjarta. Eisini Regin Smiðjur og Ólavur Riddararós fingu góða móttøku(...) tá teir komu út aftur at spæla eitt eykalag, spældu teir lagið, sum áhoyrararnir høvdu rópt eftir eina løtu: "Ramund hin unge", og hetta framúrskarandi lag var ein orkubumba, sum fekk ordiligt lív í fjøldina.

Tað er ringt at ímynda sær, at Brian McFadden hevði megnað at fara á pallin aftan á Týr."



*Mynd: Bárður Eklund*



# Dixie Hummingbirds á G!

**G!Festivalurin váttaði í morgun á heimasíðu síni at, at agg gamli gospel bólkurin The Dixie Hummingbirds fer at spæla á G!Festivalinum í ár, eins og planet.fo skrivaði í gjár**

G!FESTIVALURIN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Dixie Hummingbirds verður mettur, sum ein tann týdningarmiklasti innan gospel tónleikin. Bólkurin varð stovnaður í 1920'unum og hevur ferðast innan nógvar greinar av gospel, sum tíðin og tónleikapallurin hevur broytt seg. Bólkurin var stovnaður av James B. Davis og hansara klassafeløgum. F fyrstu tíðina sungu tey í kirkjum í grannalagnum, til limirnir vóru lidnir í skúlanum. Síðan var farið at ferðast kring suðurstatirnar í USA. Í 1938 kom Ira Tucker í bólkin, einans trettan ára gamal. Hansara songgávur og hansara stóra útstráling á pallinum var eyðkend og gjørdi hann til ein natúrligan oddamann í bólkinum. Ira gjørdist skjótt kendur fyri at vera garrvillur á pallinum, og hevur givið íblástur til nógvar tónleikarar bæði innan gospel og meira verðsligan tónleik. Nú 83 ára gamal er neyvan heilt líka nógv lív í Ira, men hann er enn ein somikið sannførandi sangari, at hann og restin av bólkinum, vóru í uppskoti til ein Grammy fyri besta siðbundnu gospel útgávu í ár.

"Teir hava sungið ígjøgnum ta stóru kreppuna, ígjøgnum embætisskeiðið hjá trettan amerikanskum forsetum, fýra stór kríggj, fimm ættarlið av amerikanarum og sjey áratíggju av tjúgundu øld. Teir persóngera úthaldni, talent og eldhuga..." Soleiðis sigur amerikanska soul-legendan Isaac Hayes m.a. um Dixie Hummingbirds. Hetta er ein týdningarmikil bólkur, ið metist at vera ein av teimum, ið James Brown og aðrir fingu íblástur frá, tá teir løgdu lunnar undir soul.

G!Festivalurin fer hesa vikuna av avdúka fimm nøvn. Í gjár vóru Young Dubliners kunngjørdir.